

www.oljan.fo

**Jan Müller** 20 - 01 - 2012

# Saudiarabia kann ikki broyta oljuprísin

Higartil hevur Saudiarabia lagt seg eftir einum oljuprísi upp á 75 dollarar fyri tunnuna, men í vikuni segði landsins oljumálaráðharri við blaðið Finacial Times, at landið hevur gjørt av at hækka málsetningin til 100 dollarar fyri tunnuna. Men spurningurin er, um tað fær nakra ávirkan. Forstjórin í Statoil, Helge Lund, sigur við Dagens Næringsliv, at hann væntar ikki, at tann saudiarabiska avgerðin fær nakran týdning. Helge Lund vísir á, at bæði oljuvinnan og altjóða búskapurin hava væl kunnað liva við einum prísi upp á millum 80 og 100 dollarar fyri tunnuna, og at tað er tað, sum hevur týdning. Hann sigur, at tað týdningarmesta er, at prísurin er rímiliga støðugur, soleiðis at vit ikki fáa ov stór sveiggj, tí tað eru tey, sum elva til trupulleikar. Spurdur, um avgerðin hjá Saudiarabia ikki fer at bera í sær, at OPEC sleppur málinum um 75 dollarar fyri tunnuna, soleiðis at prísurin fer at hækka, vísir Statoil-stjórin á, at í 2011 lá oljuprísurin fyri fyrstu ferð oman fyri 100 dollarar í meðal í eitt heilt ár, sjálvt um málið hjá Saudiarabia var 75 dollarar. Heldur ikki norski olju- og orkumálaráðharrin, Ola Borten Moe, væntar, at avgerðin hjá Saudiarabia fær nakra ávirkan. Hann vísir á, at fyri nøkrum árum síðani kundu OPEC-londini stýra oljuprísinum í rættiliga stóran mun við at regulera útboðið, men at í dag er tað í veruleikanum eftirspurningurin, sum ásetir prísin.